

## Ísland fær lán úr Noregi

Norska stjórnin hevur gjørt av at læna íslendingum 4,2 milliardir norskar krónur. Norska stjórnin kunngjørdi í gjár, at hon hevur samtykt at læna Íslandi 4,2 milliardir norskar krónur. Málið skal tó leggjast fyri Stórtingið til góðkenningar. Talan er um eitt fimm ára lán. Íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, hitti í gjár norska uttanríkisráðharran, Jonas Gahr Støre, í Reykjavík. Teir tingaðust tó ikki um lánið frá norsku stjórnini, men onnur viðurskifti, skrivar Morgunblaðið. Ísland hevur søkt um lán úr Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF, men hevur ikki fingið svar enn.

# Smyril aftur í sigling sunnudagin

**Smyril er ein dag frammanfyri tíðarætlanina og hann fer úr Danmark hósdagin**




*Arbeiðið í dokkini í Fredericia í Danmark hevur gingið so mikið væl, at Smyril verður liðugur hósdagin og kemur aftur í sigling sunnudagin*

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*
*Myndir: B.M. Laugesen*



*Her liggur so annar stabilisatorurin. Allir slitlutir eru skiftir í skipanini, so nú vónar Strandferðslan, at teir fara at halda*



*Smyril verður nú sýnaður, so at hann sleppur frá at fara í dokk aftur í tvey ár*

Tað gongur so mikið væl at fáa strandfaraskipið, Smyril, avgreiddan í dokkini í Danmark, at hann verður liðugur ein dag fyrr enn ætlað.

Upprunaliga skuldi Smyril verða aftur í sigling ímillum Havnina og Suðuroynna mánadagin, men Dánjal Andreasen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at tað verður sunnudagin, at Smyril verður aftur í sigling.

- Smyril fer úr dokkini í Fredericia hóskvøldið og hann verður í Føroyum leygardagin. Síðani skal proviantur umborð, samstundis sum hann annars skal gerast klárur at taka ímóti ferðafólki aftur, so tað verður seinnapartin sunnudagin, at hann verður settur í sigling aftur-kanska enntá longu sunnumorgunin, gongur tað avbera væl.

### Stabilisatorararnir umvældir

Í dokkini er botnurin sýnaður og málaður, eins og biladekkið er málað.

- Hann er sýnaður soleiðis, at hann nú kann sigla í tvey ár, uttan at skula aftur til sýn. Annars skuldi hann til sýn aftur næsta ár, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Men tað, sum kanska hevur mesta áhugan hjá ferðafólki, er, at stabilisatorararnir er umvældir.

- Vit hava leingi havt trupulleikar við stabilisatorunum, men nú hava vit skift allar slitlutirnar fyri at tryggja okkum sum frægast.

Men stjórin á Strandferðsluni staðfestir, at virkið, sum hevur gjørt stabilisatorararnir kann ikki veita trygd fyri at teir fara at halda hesuferð, so tað sær hann seg heldur ikki føran fyri at gera.

Hann sigur, at nú fer Strandferðslan at umhugsa hvørjir møguleikar eru og um stutta tíð fara tey at lata politiska myndugleikanum eitt tilmæli um eina varandi loysn á stabilisator-trupulleikunum.

Í hesum sambandi kann talan verða um at taka av stabilisatorunum, fyri at tað skal standa minni á teimum við tað, at teir so taka minni sjógv á seg.

Men afturfyri verða teir so vinklaðir øðrvísi, so at teir virka líka væl sum nú.

Ein annar máti er at seta tveir eyka stabilisatorar í Smyril har frammi í skipinum, so at hann hevur fýra smærri stabilisatorar, heldur enn tveir størri.

- Í øllum førum verður tað eitt krav, at framtíðarloysnin ikki ávirkar Smyril, so at hann fer at rulla verri enn hann ger nú, staðfestir Dánjal Andreasen á Strandferðsluni.